## Royna kavbátar í póløkinum



Tveir amerikanskir kjarnorkuriknir kavbátar gera í hesum døgum ymsar royndir norðan fyri Kanada og Grønland. Tað skrivar blaðið Los Angeles Times. Annar kavbáturin, USS Helena, fór úr herflotastøðini við San Diego í síðstu viku, meðan hin, sum eituir USS Annapolis, fór úr einari herflotastøð í Virginia. Eftir hesum at døma skal USS Helena sigla eystur við kanadisku strondini, meðan USS Annapolis skal sigla eystur um Hvarvið og síðani norður um Grønland í altjóða sjógvi og haðani vestureftir. Tað er ikki greitt, um Kanada er varskógvað um royndina, skrivar Los Angeles Times.

## Nógv heimleys børn í USA

Felagsskapir hjá heimleysum amerikanarum siga í einari nýggjari frágreiðing, at tvey prosent av øllum børnum í USA eru heimleys. Tað merkir sambært frágreiðingini, at hálv onur millión børn eru heimleys, og lagt verður afturat, at 42 prosent av teimum eru yngri enn seks ár. Ringast stendur til í statunum Texas, Georgia, Arkansas, New Mexico og Louisiana. Felagsskapirnir hjá teimum heimleysu í USA siga, at heimleys børn hava ofta stórar trupulleikar við heilsuni, og at bara tá fáu hava fráfaringarroynd fólkaskúlans, skrivar AP.




*- Koyrikortið er dýrt at taka, tí koyrilærarar skulu hava egin høli og virkisrakstur við roknskapi og øllum, ið hartil hoyrir. Koyrilærarar noyðast at brúka munandi part av tíð síni til virkisrakstur heldur enn frálæru, og kunnu koma í tvístøðu millum leiklutirnar sum koyrilærari og tænastuveitari, sigur Kári P. Højgaard*

*Tilgjørd mynd*

# Fastan prís fyri koyrikort

**Allir føroyingar skulu duga líka væl – ella illa – at koyra. Sjálvstýrisflokkurin vil nú skipa almenna frálæru til koyrikort, soleiðis at allir føroyingar fáa sama møguleika, somu frálæru og sama prís**

KOYRIKORT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Kári P. Højgaard og Kári á Rógvi, tingmenn fyri Sjálvstýrisflokkin, spara seg ikki við øðrvísi hugskotum. Teir nú hava tað almenna at skipa frálæruna til koyrikort.

- Koyrikortið er dýrt at taka, tí koyrilærarar skulu hava egin høli og virkisrakstur við roknskapi og øllum, ið hartil hoyrir. Koyrilærarar noyðast at brúka munandi part av tíð síni til virkisrakstur heldur enn frálæru, og kunnu koma í tvístøðu millum leiklutirnar sum koyrilærari og tænastuveitari. Soleiðis skriva Kári P. Højgaard og Kári á Rógvi, tingmenn fyri Sjálvstýrisflokkin, í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Uppskotið er ein roynd at fáa viðgjørt spurningin um koyrifrálæru. Ætlanin er at frálæran skal gerast ódýrari, skal samskipast betri við aðra skúlagongd, so sum framhaldsdeild og miðnám, og at viðurskiftini hjá koyrilærarum gerast tryggari.

### Føroyar sum undangonguland

Um orsøkina til, at Sjálvstýrisflokkurin velur at leggja hetta uppskotið fyri Tingið, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, at tað serliga er Null hugsjónin, ið teir hava í huga.

- Tað er kanska serliga null hugsjónin, sum vit hugsa um við hesum uppskotinum. Vit hava hugsað um, hvussu vit kunnu fáa eina góða útbúgving og hvussu vit kunnu fáa hana implementeraða, sigur Kári P. Højgaard.

Hugskotið kemur úr baklandinum hjá Sjálvstýrisflokkinum, og Kári P. Højgaard veit ikki um ponnur lond, ið hava tikið líknandi stig.

- Føroyar kunnu gerast undangonguland innan ferðslu. Vit eru eitt lítið land, og tað er yvirskoðiligt og lættari at gjøgnumføra her, enn í einum av størru londunum, greiðir Kári P. Højgaard frá.

### Sama prís fyri øll

Í dagsins samfelag er tað ein mannarættur at fáa koyrikort, sigur Sjálvstýrisflokkurin. So at siga hvørt húski, har ein líkinda vegarstubbi er, hevur bil, í summum meira enn tann eina. Nærum hvør borgari, ið hevur aldur og evni til at ogna sær eitt koyrikort, fer undir at fáa sær tað, sigur Sjálvstýrisflokkurin í viðmerkingunum, og leggur Kári P. Højgaard afturat.

- Tað hevur verið stórur kritikkur um tímatalið. Nógv hava tyngri við at læra at koyra, og tað hevur verið kjak um hetta við tímunum, um teir nú fáa tað kravda tímatalið. Ójavnt er eisini, hvussu ráðini eru hjá foreldrum ella ungum fólki at rinda fyri kortið. Næmingarnir taka tí bara teir neyðugu tímarnar fyri at standa royndina, go kundu kortini trongt til meiri koyrivenjing fyri at gerast tryggir vegfarandi. Rættast hevði tí verið at ásett ein fastan prís fyri eitt koyrikort til persónbil, og so fekk næmingurin teir neyðugu tímarnar, ið skuldu til fyri at gerast ein góður bilførari.

### Byrja frá barnsbeini

Ein annar partur av uppskotinum um at tað almenna skal skipa fyri frálæruni til koyrikort er, at læran skal byrja hjá teimum allar minstu.

- Løgreglan plagar at koma út í skúlarnar at greiða frá ymiskum, og tað hevði eisini verið gott, um mann byrjaði at læra børnini um ferðslu beinanvegin. Vit meta tað verða neyðugt at fáa tað inn í medvitið beinanvegin, at ein dag skulu hesi børnini jú sjálvi út at koyra, sigur Kári P. Højgaard.

Hann leggur afturat, at tað eru nógvir mátar at hetta kann skipast upp á, og at hugskotini eru fleiri, um hvussu henda skipanin skal setast í verk, og hvat hon skal innihalda, so at einki er definitivt.

# Kritikkur til koyrilærarar

**Føroyskir koyrilærarar fáa harðan kritikk frá Sjálvstýrisflokkinum. Eitt nú verður sagt at tað er kostnaðurin, ið ger av, hvussu frálæran verður**

KOYRIKORT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Almennu Føroyar bjóða flestu útbúgvingar ókeypis. Stóra undantakið er koyrikortið, sum verður tikið á privatskúlum. Hóast vit eru sera heppin við dugnaligum koyrilærarum, ið seta trygd og dygd í hásæti, so er skipanin óheppin á mangan hátt. Soleiðis skriva Kári á Rógvi og Kári P. Højgaard í viðmerkingunum til lógaruppskotið um at frálæran til koyrikort skal gerast almenn.

Í viðmerkingunum til uppskotið stendur ósemja millum koyrilærarar millum tey atlit, ið eru tikin fyri uppskotinum.

»Støðan í dag er ikki góð. Vit hoyra, at ymiskt er, hvussu skipaða lesiætlanin verður umsitin, vit síggja á heimasíðu hjá koyriskúla, hvussuósamdirkoyrilærarar eru, og hvussu funnist verður at frálæruni hjá øðrum lærarum. Verður hetta tikið fyri fult, er neyðugt at fáa eina skipaða frálæru, sum kemur undir alment eftirlit skjótast gjørligt, tí tað er sera umráðandi, at vit fáa so góðar bilførara sum gjørligt.«

Hetta má skiljast sum at Sjálvstýrisflokkurin nú leggur seg út í ósemjuna millum koyrilærarar sínamillum og Akstovuna.

Víðari stendur soleiðis. »Tekur tað almenna sær av frálæruni eftir einum leisti, fáa vit eina eins skipaða frálæru. Tá vita vit, at øll, sum fáa koyrikort, hava fingið somu frálæru eftir teirri tíð, ið hvørjum einstøkum tørvar fyri at gerast ein góður bilførari. Tá er tað ikki kostnaðurin, ið ger av, hvussu frálæran verður.«




*Koyrilærarar liggja í skotlinjuni, nú Sjálvstýrisflokkurin vil gera frálæruna almenna*

*Modellmynd*